Ognarfelag Tryggingartakaranna

Reglugerð fyri
**Betri Stuðul**

Vísandi til viðtøkur fyri Ognarfelagi Tryggingartakaranna (hereftir OT), §3, stk. 2, setur nevndin samsvarandi góðkenning frá aðalfundi hesa reglugerð í gildi.

## § 1
## Heiti og heimstaður

***Stk. 1.*** Heitið er Betri Stuðul.
***Stk. 2.*** Betri Stuðul er partur av virkseminum hjá OT og er ikki ein sjálvstøðug løgfrøðilig eind.

## § 2
## Endamál

***Stk. 1.*** Endamálið er, at skapa tryggleika umvegis stuðul, undantikið rakstrarstuðul, til virksemi, ið gagnar tryggingartakarum, millum annað virksemi, ið er:

1) Skaðafyribyrgjandi
2) Sjúkufyribyrgjandi
3) Tryggleikaskapandi

***Stk. 2.*** Stuðul kann eisini latast til annað samfelagsgagnligt virksemi, millum annað til list, gransking og mentanarlig átøk.
***Stk. 3.*** Betri Stuðul kann virka sum stigtakari, samskipari og/ella stuðul.

## § 3
## Stuðulsupphædd

***Stk. 1.*** Stuðulsupphæddin verður ásett árliga av nevndini í OT í sambandi við støðutakan til afturbering.

## § 4
## Nevnd

***Stk. 1.*** Nevndin, ið hevur evstu ábyrgd av øllum viðurskiftum viðvíkjandi Betri Stuðul, hevur 4 limir, ið eru valdir á henda hátt:

1) Tvey umboð úr nevndini hjá OT
2) Tveir umboðsráðslimir hjá OT

***Stk. 2.*** Formaðurin í nevndini í OT er eisini formaður í nevndini í Betri Stuðul.
***Stk. 3.*** Nevndarlimir verða valdir fyri tvey ár í senn.

**§ 5**
**Nevndarfundir**

***Stk. 1.*** Nevndin hevur fund 2 ferðir um árið, ella eftir tørvi.
***Stk. 2.*** Fundarætlan verður løgd fyri alt árið við ársbyrjan.
***Stk. 3.*** Fundur verður hildin um í minsta lagi tveir nevndarlimir skrivliga hava sett fram ynski um hetta.
***Stk. 4.*** Fundarskráin skal í minsta lagi innihalda fylgjandi fundarevni:

1) Góðkenning av fundarfrágreiðing
2) Fíggjarstøða
3) Innstillaðar umsóknir
4) Onnur mál
5) Ymiskt

***Stk. 5.*** Nevndarformaðurin stjórnar nevndarfundum.
***Stk. 6.*** Fundurin er viðtøkuførur um í minsta lagi 3 av 4 nevndarlimum eru møttir á fundi.
***Stk. 7.*** Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.
***Stk. 8.*** Stjórn og grannskoðan hava rætt til at møta á nevndarfundi, og kunnu taka orðið á fundinum.
***Stk. 9.*** Fundarfrásøgn verður skrivað frá øllum nevndarfundum, ið skal góðkennast og undirskrivast á fyrst komandi nevndarfundi.
***Stk. 10.*** Fyrra hálvár í hvørjum ári verður ársfrásøgn og ársroknskapur gjørdur fyri virksemið í Betri Stuðli. Ársfrásøgn og ársroknskapur verða løgd fyri nevndina í OT til góðkenningar.

**§ 6**
**Umsiting**

***Stk. 1.*** Betri Stuðul er samsvarandi § 1 partur av OT og verður dagliga leiðslan at útinna av leiðsluni í OT.
***Stk. 2.*** Stjórnin móttekur og viðger umsóknir samsvarandi § 2, ger uppskot til tilmæli til nevndina fyri Betri Stuðul, og sendir fráboðan til umsøkjara um niðurstøðu eftir nevndarviðgerð.
***Stk. 3.*** Stjórn letur nevndini tilmæli um allar innkomnar umsóknir, ið nevndin tekur støðu til. Undantikið eru umsóknir har søkt verður um kr. 300.000 ella minni, sum stjórnin hevur heimild til at viðgera og avgera sjálv.
***Stk. 4.*** Stjórnin fyriskipar marknaðarføring av Betri Stuðli og virksemi tess.
***Stk. 5.*** Fyrra hálvár í hvørjum ári ger stjórnin, í samráð við nevndina í Betri Stuðli, ársroknskap fyri virksemið hjá Betri Stuðul.

**§ 7**
**Gildiskoma og avtøka**

***Stk. 1.*** Hendan reglugerð hevur gildi tá ið hon er samtykt av aðalfundi í OT.
***Stk. 2.*** Broytingar í reglugerðini kunnu fremjast tá nevndin í OT hevur tikið avgerð um hetta og broytingin er góðkend av aðalfundi í OT.
***Stk. 3.*** Betri Stuðul kann avtakast tá nevndin í OT hevur tikið avgerð um hetta og avtøkan er góðkend av aðalfundi í OT.

***Samtykt á aðalfundi Tórshavn, 10. apríl 2026***

***Nevndin í P/F Ognarfelag Tryggingartakaranna***